# Aftur sildarok í Kollafirði – n



*Stjórin og góðskuleiðarin kanna sildafløkini, sum komin eru úr maskinunum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*




**Síðan Saksaberg landaði fyrstu nøgdirnar av sild á hesum sinni í síðstu, hava tey havt úr at gera á Kollafjord Pelagic. Arbeitt verður alt samdøgnið, og sildin verður skorin til butterfly-fløk. Longu í hesi vikuni vænta tey á virkinum, at hampiligar nøgdir av sildafløkum verða avskipað um danska samstarvsfelagið í Skagen til norðurevropeiska marknaðin**

SILDAARBEIÐI
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Á Kollafjord Pelagic hava tey seinastu dagarnar havt úr at gera við at skera sild, sum skipini, Saksaberg og Jupiter, hava fingið í føroyskum sjógvi sunnanfyri.

Hildið verður, at sildin er ein blandingur av norðhavssild og norðsjóvarsild.

### 1100 tons

Saksaberg hevði eini 500 tons í síðstu viku og Jupiter eini 600 tons í hesi vikuni, so tilsamans hevur Kollafjord Pelagic keypt 1100 tons av sild.

Sildin verður skorin til butterfly-fløk, og verður í samstarvi við danska felagið, Taabbel í Skagen, send á norðurevropeiska marknaðin, serliga til Týsklands.



*Nógv er at gera, og lagið er gott á Kollafjord Pelagic*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Tvær støddir

Á Kollafjord Pelagic hava tey seks baader- maskinur, sum skera rávøruna, ið verður pakkað í tvær støddir.

Sildin verður býtt upp í tað, sum rópt verður, 10-16 og 12-18 stykkir til hvørt kilo. Síðan verður hon fryst í 20 kilo stórar blokkar og útflutt.

Tá ið sildin verður butterfly-skorin, hanga tvey og tvey fløk saman í skæðuni í rygginum, men sjálvur ryggurin er skorin burtur.

### Gongur væl

Á Kollafjord Pelagic siga tey, at framleiðslan higartil hevur gingið nógv betur enn væntað, nú hetta er fyrstu ferð, at virkið burtur av sker sildina.

Arbeitt hevur verið í vaktum, har 20 fólk hava